Ítróttar
# Sosialurin
Nr. 80 • mikudagur • 26. apríl 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Sivic nýggjur venjari hjá Uganda

**Tomislav Sivic, sum hevur vant VB, B36 og KÍ, varð í gjár avdúkaður sum nýggjur landsliðsvenjari í Uganda. Málið hjá Sivic verður at fáa Uganda við til endaspælið um afrikanska meistaraheitið í 2008**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tomislav Sivic var í fleiri ár ein profilur í føroyskum fótbólti. Hann kom miðskeiðis í 90'unum til Føroya at venja VB, og seinni vandi hann eisini B36 og KÍ. Eftir at hann gavst sum venjari í KÍ í 2002, fór hann av landinum og hevur síðani virkað sum venjari í heimlandinum.

Nú hevur Sivic fingið eina heilt aðra og øðrvísi uppgávu, tí í gjár varð hann avdúkaður sum nýggjur landsliðsvenjari hjá Uganda.

Sivic, sum nú er 39 ára gamal, hevur gjørt ein tvey ára sáttmála við fótbóltssambandið í Uganda, og sambært BBC verður árslønin hjá honum umleið 400.000 krónur. Sáttmálin er gjørdur soleiðis, at hann kann leingjast við tveimum árum, um partarnir ynskja tað.

### Hava álit á Sivic

Formaðurin fyri fótbóltssambandið í Uganda roknar við, at Sivic kann leiða landið til endaspælið um afrikanska meistaraheitið í 2008.

– Vit hava álit á Sivic, og tí valdu vit hann fram um 20 aðrar umsøkjarar. Vit rokna við, at Sivic fer at arbeiða miðvíst á øllum økjum, so vit kunnu náa okkara máli, sigur Lawrence Mulindwa við BBC Sport.

Tomislav Sivic avloysir Mohammed Abbas úr Egyptalandi, sum fekk sekkin herfyri, og Sivic byrjar í nýggja starvinum í næsta mánaði.

– Eg eri sera fegin um at koma til Uganda, og eg ælti mær at føra landið til African Nations Cup fyri fyrstu ferð í 30 ár, sigur Tomislav Sivic sambært BBC.



*– Eg eri sera fegin um at koma til Uganda, og eg ælti mær at føra landið til African Nations Cup fyri fyrstu ferð í 30 ár, sigur Tomislav Sivic.*
*Mynd: Alexander Djorovic*


ШАНСА У АФРИЦИ

**СИВИЋ У УГАНДИ**

**Томислав Сивић** нови је селектор Уганде, коју ће кроз квалификације које почињу најесен покушати да одведе на завршни турнир Купа Африке 2008. године.

Бивши селектор кадетске репрезентације СЦГ и тренер Смедерева отпутовао је у ову афричку земљу, где ће и потписати уговор и затим се 3. маја вратити у СЦГ.

Д. А.

### Venjari í Serbia

Tomislav Sivic hevur seinnu árini virkað sum venjari í Serbia, hann hevur vant eitt av ungdómslandsliðunum hjá landinum, og hann hevur eisini staðið á odda fyri felagið Smedorovo, ið hevur spælt í bestu deildini. Men hetta samstarvið endaði fyri einari tíð síðani.

Nú Sivic fer til Uganda at starvast, er hann tann triði serbiski venjari, sum roynir seg í landinum. Undankappingin til afrikanska meistaraskapin byrjar í september, og Uganda er komið í bólk saman við Lesotho, Niger og Nigeria.

Uganda hevur ikki verið við í endaspælinum síðani 1978, tá ið teir taptu finaluna 2-0 ímóti vertstjóðini Ghana.

## Leirvík fingið nýggjan vøll

Leygardagin fingið leirvíkingar ein nýggjan fótbóltsvøll. Hetta er ein av sparkivøllunum, sum eru ella verða gjørdir kring landið. Tað er Fótbóltssamband Føroya, sum vegna UEFA hevur tikið stig til at gera smáu fótbóltsvøllirnar kring landið.

Niklas á Líðarenda, sum er limur í starvsnevndini hjá FSF, handaði Leirvíkar kommunu vøllin leygardagin. Lítið hátíðarhald var í illsliga veðrinum leygardagin, og so løgdu børnini til brots at spæla beinanvegin.

Hetta er tann triði sparkivøllurin, sum higartil er alment tikin í nýtslu, og ætlanin er, at FSF í samstarvi við kommunur, landsmyndugleikar og vinnilívið skal byggja tilsamans 40 sparkivallir tey næstu tvey árini.

## KR tapti aftur

Rógvi Jacobsen og liðfelagarnir spældu mánakvøldið dyst ímóti Fjølni, og aftur hesaferð mátti KR lúta. Dysturin endaði við 1-0 til Fjølni. Dysturin var spældur innandura í Egilshøllini. Rógvi Jacobsen spældi í álopinum hjá KR í ein tíma, áðrenn hann varð skiftur út. KR spælir næsta dystin um vikuskiftið, hann verður ímóti Grindavík.

## Start fær ikki mál

Trupulleikarnir hjá norska felagnum Start eru nú eyðsýndir. Eftir tríggjar dystir í norsku tippuliguni hevur felagið framvegis ikki skorað eitt mál. Tveir av dystunum eru endaðir við tapi, meðan tann triði endaði sum málleysur javnleikur.

Ítróttarredaktørurin á Fedrelandsvennen skrivar í einari viðmerking, at um Start ikki fær hol á málskjótingina beinanvegin, verður kappingarárið sera trupult.

Mánakvøldið tapti Start uttan Toda Jónsson á liðnum 1-0 ímóti Brann.

- Mánadagin skuldi Todi steðga málturkinum á liðnum, men hann gjørdist sjúkur. Faktum er nú, at Start hevur einki mál gjørt í ár, og tað er álvarsamt, skrivar Svein Enersen í sínari grein.

Næsti dysturin hjá Start verður ímóti Viking leygardagin.